# SÁTTMÁLI

**millum**

# Tannlæknafelagið

**og**

# Fíggjarmálaráðið

**um**

## tannlæknahjálp

**1. oktober 2014**

## 1. Kapittul – Inngangur

**§ 1.** Hesin sáttmáli um ískoyti til gjald fyri tannlæknahjálp er gjørdur millum Tannlæknafelagið og Fíggjarmálaráðið.

**§ 2.** Sáttmálin fevnir um tannlæknahjálp, sum er ásett í kunngerð við heimild í løgtingslóg um almenna heilsutrygd.
*Stk. 2.* Aðrar avtalur um gjald fyri tannlæknahjálp mugu ikki verða gjørdar uttan semju millum sáttmálapartarnar og í samráð við Heilsumálaráðið.

## 2. Kapittul – Treytir fyri at virka undir skipanini

**§ 3.** Tannlækni, sum vil verða fevndur av hesum sáttmála, sendir umsókn til Heilsutrygd.
*Stk. 2.* Umsóknin verður skrivað á umsóknarblað, sum Heilsutrygd og Tannlæknafelagið hava góðkent.
*Stk. 3.* Heilsutrygd kannar, um tannlæknin lýkur treytirnar um førleikar, sum eru ásettar í Anordning nr. 1472 frá 16. december 2013 om ikrafttræden for Færøerne af lov om autorisation af sundhedspersoner og om sundhedsfaglig virksomhed. Bara tannlæknar, sum lúka hesar treytir, kunnu verða fevndir av hesum sáttmála.
*Stk. 3.* Heilsutrygd sendir tannlæknanum váttan um upptøku í sáttmálan. Váttanin verður skrivað á váttanarskjal, sum Heilsutrygd og Tannlæknafelagið hava góðkent.

**§ 4.** Tannlækni verður fevndur av sáttmálanum við at hetta verður fráboðað frammanundan við 1 mánað freist til tann 1. í einum mánaði.

**§ 5.** Tannlækni kann við 3 mánaða freist til 1. í einum mánaði boða frá, at viðkomandi tekur seg úr arbeiðinum sambært hesum sáttmála.
*Stk. 2.* Uppsøgnin skal vera skrivlig og skal latast Heilsutrygd.

**§ 6.** Tannlækni, sum er fevndur av hesum sáttmála og útinnir viðgerð sambært talvu galdandi fyri henda sáttmála, hevur skyldu til at fylgja ásetingunum í hesum sáttmála.
*Stk. 2.* Tannlæknin skal kunna seg um sáttmálaavgerðir og fyrisitingina av teimum.

**§ 7.** Tannlækni, sum hevur farloyvi, kann lata øðrum tannlækna virksemið. Farloyvi kann vanliga ikki vara longur enn 1 ár.
*Stk. 2.* Heilsutrygd skal góðkenna farloyvi, sum er longur enn 1 ár.
*Stk. 3.* Tá ið tannlækni fer í farloyvi og letur annan tannlækna røkja virksemið sína vegna, skal tannlæknin, sum kemur í staðin, lúka tær í §§ 3 - 6 ásettu treytir.
*Stk. 4.* Tá ið tannlækni letur annan tannlækna røkja tannlæknaviðtaluna sína vegna, skal tað verða fráboðað Heilsutrygd, áðrenn avhendingin kann fara fram. Heilsutrygd skal samstundis hava boð um, hvussu langt tíðarskeið, talan er um. Avhendingin fær virknað, tá ið Heilsutrygd skrivliga hevur boðað tannlæknanum, sum røkir starvið vegna hin tannlæknan, frá góðkenningini.

**§ 8.** Heilsutrygd kunnar um, hvørjir tannlæknar virka í skipanini. Heilsutrygd og Tannlæknafelagið kunna um skipanina á alnetinum.

## 3. Kapittul – Tannlæknaval

**§ 9.** Borgarar hava frítt at velja ímillum teir tannlæknar, sum eru fevndir av hesum sáttmála.

## 4. Kapittul - Skjalaprógv og skjalagoymsla

**§ 10.** Tannlæknin skjalprógvar viðgerðir sínar.

## 5. Kapittul – At skipa tannlæknaviðtalur

**§ 11. Viðtalusløg**
Tannlæknaviðtalur kunnu verða skipaðar sum einstaklingaviðtalur, samognarfelagsskapur ella partafelag. Hesi trý viðtalusløgini kunnu virka í samstarvsviðtalu.

a. Við einstakligaviðtalu er at skilja: Tannlæknavirksemi, sum ein einstakur tannlækni útinnur uttan felagsskap við aðrar tannlæknar um fíggjarlig viðurskifti.
b. Við samognarfelagsskap er at skilja: Tannlæknaviðtala, sum tveir ella fleiri tannlæknar reka, og eru felags um fíggjarlig viðurskifti, høli og starvsfólk.
c. Við partafelag er at skilja: At ein ella fleiri tannlæknar verða settir í starv í einum partafelag, sum hevur til endamáls at útinna tannlæknavirksemi.
d. Við samstarvsviðtalu er at skilja: Viðtala, sum verður rikin í samstarvi millum fleiri einstaklinga- og/ella samognarfelagsskapir og/ella partafeløg við einum ávísum felagsskapi um høli og starvsfólk.

*Stk. 2.* Í øllum teimum ymisku viðtalunum kunnu tannlæknalig hjálparfólk virka, t.d. kliniskir assistentar, klinikkassistentar og tannrøktarar.

## 6. Kapittul – Fyriskipa heilivág

**§ 12.** Tá ið tannlækni sum liður í viðgerð fyriskipar heilivág, sum Heilsutrygd veitir ískoyti til, verður forskriftin útfylt samsvarandi ásetingunum í kunngerðini um forskriftir og forskriftaskyldu.

## 7. Kapittul – Viðgerðarsløg

**§ 13.** Hesin sáttmáli fevnir um tey sløgini av tannlæknahjálp, sum eru ásett í talvu, galdandi fyri henda sáttmála.

## 8. Kapittul – Gjøld

**§ 14.** Gjøld fyri tannlæknahjálp hjá tannlækna eru ásett í talvu, hoyrandi til henda sáttmála.
*Stk. 2.* Gjøldini verða stillað hvønn tann 1. oktober, helvt um helvt eftir lønarvøkstri í almenna geiranum og prístalsvøkstri undanfarna ár. Lønarvøksturin verður roknaður frá 1. oktober til 1. oktober. Prístalsvøksturin verður roknaður eftir prístalinum 2. ársfjórðing til prístalið 2. ársfjórðing árið eftir.

## 9. Kapittul – Avrokningarskipan

**§ 15.** Tannlæknin avroknar við Heilsutrygd vegna borgaran.

**§ 16.** Nýtt verður ein talgild avrokniningarskipan, sum Heilsutrygd og Tannlæknafelagið hava góðkent.

**§ 17.** Í sambandi við tannlæknahjálp sambært hesum sáttmála verður nýtt avrokningarblað, sum er gjørt eftir avtalu millum Heilsutrygd og Tannlæknafelagið.
*Stk. 2.* Avrokningarblaðið verður útfylt sambært reglum, sum Heilsutrygd og Tannlæknafelagið hava gjørt.

**§ 18.** Á talgilda avrokningarblaðnum skal standa navn, bústaður og føðingardagur hjá tí, sum hevur fingið tannlæknahjálp, dagfestur viðgerðardagur, hvørjar og hvussu nógvar viðgerðir. Á talgilda avrokningarblaðnum skal eisini standa navn tannlæknans, starvsstaður, samlaða gjaldið, ískoytisveiting frá Heilsutrygd og partur av gjaldinum hjá tí, sum hevur fingið tannlæknahjálp.

**§ 19.** Tannlæknin sendir eina ferð um mánaðin Heilsutrygd talgilda avrokningartilfarið fyri lidnar viðgerðir í einum álmanakkamánaði.

**§ 20.** Avrokningartilfarið fevnir um eina av pørtunum avtalaða samlaða talgilda uppgerð og talgildu avrokningarbløðini.

**§ 21.** Útgjald av ágóða fyri avrokningartilfar sent inn fyri tann 5. í mánaðinum, skal fara fram á slíkan hátt, at upphæddin vanliga er tøk innan tann 20. í mánaðinum.

**§ 22.** Við avrokning verða útrokningar hjá Heilsutrygd nýttar.

## 10. Kapittul – Árligur fundur

**§ 23.** Tannlæknafelagið og Heilsutrygd hava ein fund árliga og annars, tá ið annar ella báðir partar ynskja tað. Á fundunum kunnu partarnir umrøða mál, sum hava til endamáls at fáa ásetingarnar í sáttmálanum framdar í verki, herundir eisini umrøða spurningar og trætur, sum kunnu stinga seg upp partanna millum.

## 11. Kapittul – Gildiskoma og uppsøgn

**§ 24.** Sáttmálin fær gildi 1. oktober 2014.
*Stk. 2.* Í sáttmálaskeiðnum kunnu báðir partar siga sáttmálan upp við í minsta lagi 3 mánaða freist at fara úr gildi hin 1. í einum mánaði, tó í fyrsta lagi 1. oktober 2017.
*Stk. 3.* Eru partarnir samdir um at broyta einstakar partar í ásetingunum í sáttmálanum, kann tað verða gjørt í sáttmálatíðini uttan uppsøgn.

*Á Argjum tann 30. september 2014*

| ***Tannlæknafelagið*** | ***Fíggjarmálaráðið*** |
|---|---|
| *Oddmar Færø, formaður* | *Jørgen Niclasen, landsstýrismaður* |
| | *Snorri Fjallsbak, stjóri* |

**Tannlæknafelagið - Heilsutrygd - Fíggjarmálaráðið**

**Talva – Veitingar og gjøld tann 1. oktober 2014**

**1. Diagnostikkur o.a.**

| | Veitingar | Borgari | Heilsu-trygd | Í alt |
|---|---|---|---|---|
| 1110 | Klinisk kanning (23 ár og eldri) | 98,00 | 80,87 | 178,87 |
| | Klinisk kanning (18 - 22 ár) | 0,00 | 178,87 | 178,87 |
| 1320 | Tannreinsan | 174,00 | 142,98 | 316,98 |
| 1201 | Røntgenmynd | 79,00 | 64,80 | 143,80 |
| 1202 | Ortopanmynd | | 127,27 | |
| 2920 | Fyribyrgjandi einstaklingaviðgerð | 137,00 | 112,05 | 249,05 |
| 2930 | Eftirlit eftir fyribyrgjandi viðgerð | 110,00 | 89,23 | 199,23 |
| 3010 | Hygiejneískoyti | 28,00 | | |

**2. Tannfyllingar**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1501 | a. Einkult, amalgam | 203,00 | 50,13 | 253,13 |
| 1502 | b. Sambundin, amalgam | 258,00 | 65,09 | 323,09 |
| 1503 | c. Tvísambundin, amalgam | 339,00 | 84,88 | 423,88 |
| 1504 | d. Emaljusementfylling | 164,00 | 123,56 | 287,56 |
| 1505 | e. Plastfylling, ein flati | 323,00 | 138,89 | 461,89 |
| 1506 | f. Plastfylling, fleiri flatar | | 129,35 | |
| 1507 | g. Glasionomerfylling | 323,00 | 138,89 | 461,89 |
| 1508 | h. Foyrufylling | 144,00 | 109,13 | 253,13 |
| 1511 | i. Einkult, plast (stor occ. i præmolar) | | 113,81 | |
| 1512 | j. Sambundun, plast (præmolar) | | 145,12 | |
| 1513 | k.Tvísambundin, plast (præmolar) | | 191,00 | |
| 1521 | i. Einkult, plast (stor occ. i molar) | | 113,81 | |
| 1522 | j. Sambundun, plast (molar) | | 145,12 | |
| 1523 | k.Tvísambundin, plast (molar) | | 191,00 | |

**3. Rótviðgerð / Pulpaviðgerð**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1600 | a. Pulpaskurður | 179,00 | 135,33 | 314,33 |
| 1601 | b. Krúnupulpatøka | 205,00 | 154,32 | 359,32 |
| 1602 | c. Rótpulpatøka og rótfylling í eina kanal | 322,00 | 242,67 | 564,67 |
| 1603 | d. Rótfylling í hvørja fylgjandi kanal | 88,00 | 65,97 | 153,97 |
| 1604 | e. Rótskol | 117,00 | 88,35 | 205,35 |
| 1610 | f. Takstískoyti til rótviðgerð | | 100,00 | |
| 1620 | g. Bráðfeingis opnan til pulpa | 202,00 | 152,65 | 354,65 |

**4. Tannhaldsviðgerð o.a.**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1420 | Vanlig tannhaldsviðgerð | 445,00 | 336,16 | 781,16 |
| 1431 | Rótreinsan (pr tonn yvir 5 mm poche) | 90,00 | 68,50 | 158,50 |
| 1452 | Eftirlit eftir tannhaldsviðgerð | 116,00 | 87,76 | 203,76 |
| 1430 | Víðkað tannhaldsviðgerð | 714,00 | 537,99 | 1251,99 |
| 1440 | Eftirlit eftir víðkaða tannhaldsviðgerð | 139,00 | 104,48 | 243,48 |
| 1801 | Tanntøka og skurðviðgerð | | 100,00 | |